# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kistan við Jenny Mouritsen** úr Sørvági fer av Ellisheiminum á Sýnini hóskvøldið klokkan 18 í Sørvágs kirkju. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju fríggjadagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið ætla at senda blómur ella krans, kunnu í staðin lata Sørvágs kirkju eina gávu.

**Rúni Berg** andaðist í Hirtshals sunnudagin, 48 ára gamal.

†

Góða mamma, vermamma og omma okkara

**Margith Joensen**

andaðist á Sambýlinum á Heygnum í Klaksvík, sunnukvøldið t. 21. mars, 84 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin kl. 13.

**Súsanna, Johanna Cathrina, Jákup, Marianna, Christina Elisabeth og Julianna**

Tey, ið ynskja at minnast Margith við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata Sandvíkar kirkju eina peningagávu, konta í Eik Banka

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at elskaði sonur og beiggi okkara

**Rúni Berg**

andaðist í Hirtshals sunnudagin, 48 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Johs. Berg**

## MERKISDAGAR

**Jarnbrúdleyp**
Hósdagin 25. mars hava hjúnini Fía og Jens Pauli Joensen (Boy) Vágsgeil 2 Klaksvík verið gift í 70 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Ein heilsan til diamantbrúðarparið:

# Ruth og Robert á Lakjuni í Fuglafirði



Sum árini koma, eru tað nakrar myndir, sum fløða fram í hugan, bæði av einstøkum persónum og støðum, og sum tú aftur og aftur hevur lyndi at dvølja við. Og helst frá einari farnari tíð - .

Ein stillførur drongur kom undir krígnum í læru í Blikk- og Rørsmiðjuni hjá P/f J. F. Kjølbro á Fornagørðum í Klaksvík. Robert æt hann og var úr Fuglafirði, sonur Elisabeth og Pól á Lakjuni, sum í bestu árum doyði brádliga av vanlukku frá einum stórum barnaflokki. Lærumeistari á Fornagørðum tá var gløggi fuglfirðingurin Erling Høgnesen.

Hetta hugfarsliga staðið, á Fornagørðum er nú, sum tilhald, handil og smiðja avtoftað og horvið – alt er nú bara minnir – og talan var ikki bara um eina vanliga blikksmiðju sum so. Tí smiðjan var hendinga væl útgjørd við dreygibonki, sveisitólum og alskyns amboðum og hentleikum til handar til nærum markleysar uppgávur, sum fevndu um alt tá hugsandi: líka frá dyllum, lanternum, skipsmessuútgerð, bakarovnar, gelendarar, luftventilum, roykhanus'ar, hvalabak til útróðrabátar, takrennur, kopartøk, varma, rør og sanitet og stóru ís-sliskurnar á Kósabrúnni - ikki at forgloyma!

Har vóru fleiri dámligir hegnismenn. Fyri bara at nevna onkrar millum eldra liðið: brøðurnir báðir: Jákup Jacobsen og Karl Jakku Ósá. Og eitt nú Dánjal, Robert, Leivur og Fridtjof (myndahøggarin) umfram Levi, Steinmund, Eyolv o.s.fr..

Og so komu støðugt inn á gólvi ein hópur av inntonktu lokalu "uppfinnarum" við eini vón og væntu um ein beina – at fáa latið síni hugskot í ein handverksligan búnað. Eitt nú "originalar" sum: Óla Jákup Jacobsen við síni slóðbrótandi egningarmaskinu, Erling Laksafoss við oljufýring til sethúsini (tann fyrsta í býnum?) og Eliesar í Bókhandlinum (turkitól til uppvask – fyri sína tíð) o.m.m.a.

Har, ið ungdómur er, er lív og kæti. Fyrsti lærlingur í smiðjuni var Niels Juel Arge og síðani Dánjal hjá Victor úr Fuglafirði, og seinni komu fleiri haðani úr bygdini. Fittir menn, hesir, og góðir handverkarar, men sum hinvegin, kanska, ikki høvdu so lætt við at ganga frá sínum meiningum. So varð hildið. Og tí helt ein skemtari í smiðjuni ein dagin fyri: "At høvdu fuglfirðingar verið áir, ja, so høvdu teir allir runnið niðaneftir - (!)"

Tað spøkti illa á Fornagørðum. Tað vitstu øll í bygdini. Men, sum Erling so hittinorðað helt fyri, at tað bilti ikki, tí eingin vitsti um at siga, at nakað spøkilsi nakrantíð hevði gjørt nøkrum nakað ilt!

Tað var eitt vakurt og tekkiligt par, sum nakað seinni fór at halda saman, Robert og Ruth, yngsta dóttir Kristionnu (Giddu) og Jens Christian á Gørðum. Ruth arbeiddi tá í handlinum hjá J. Michael Jacobsen, "hjá Kal", sum var ein høvuðshandil í bygdini og eitt savningarstað fyri ung og eldri.

Og í 1950 varð dupultbrúdleyp hildið á Gørðum, tí umframt Ruth og Robert giftist systir hennara, Hildibjarta, sama dag við Arnholdi Jacobsen. Í heiminum á Gørðum vóru átta systkin: Símun, Elsebeth-Maria (Ebbemia), Hanus, Astrid, John, Jógvan, Hildibjarta og Ruth.

Ruth og Robert fingu fýra børn: Marni, Gidda, Anna og Christina.

Um Robert er at stutt siga, at hann er óvanliga sáttligur og beinasamur maður. Eitt "góðdýr" at umgangast og at arbeiða saman við. Hann hevur – eins og Ruth – eina sera góða sangrødd, stúttur á nótanum og fer sum bassur ein hálvan oktav (ella heilan?) niður um vanligar mansrøddir (!).

Og tey bæði hava í hesi tænastu sungið í sangkóri á stevnum og á møtum í mong ár. Ruth var millum bestu solo-røddirnar í Betesda-kórinum. Og tað var bæði sárt og rørandi at hoyra tey bæði syngja duett saman - uppi yvir børuni hjá einkarsyni teirra, Marna - táið hesin fór til gravar í góðum árum - fyri einum 1½ árum síðani.

Ruth hevur verið ein dyggur stuðul og staðið Roberti við lið øll hesi mongu ár. Parturin hjá teimum báðum í Zarepta og á mongu, mongu ferðunum við margfaldari hjálp til Rumeniu liggur ikki eftir, men tað vita mongu lagsfelagar teirra í trúfesti - meiri at siga frá um - !

Vit verða tíverri ikki heima á hesum stóra degi tykkara, og vilja tí við hesum í takksemi ynskja tykkum og øllum tykkara hjartaliga til lukku við degnum, Harrans signing og alt gott í komandi tíð.

**Annelena og Arnstein Niclasen**

# Ludvík í Lítluvík



Frá fríggjadegnum 26. til mánadagin 29. mars hevur Ludvík Breckmann listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Ungi havnarmaðurin Ludvík Breckmann hevur onkuntíð fyrr sýnt fram nakrar stakar myndir, sum hann hevur málað, eitt nú í Listaglugganum á ólavsøku. Við hesi málningaframsýningini í Smiðjuni er tað fyrstu ferð, at hann skipar fyri síni egnu sýning.

Umframt einar 20 oljumálningar eru eisini nakrar vatnlitsmyndir við á framsýningini. Málningarnir eru frá tí náttúrliga um tað hálvabstrakta, tó at teir flestu eru av persónum undir ymiskum umstøðum, sum t.d. í skemti, vertskapi ella til arbeiðis fyrr og nú.

Framsýningin er opin fríggjadagin frá kl. 16-19, leygardagin frá 12-18, og sunnudagin og mánadagin frá kl. 14-18.

**-red**